# Veitarasáttmáli

**millum**
**Gjaldstovan – KT Landsins og**
**[navn á veitara]**

| | |
|---|---|
| **Grundarlag** | Sáttmálin fevnir um verkætlanarleiðslu í sambandi við Skúlanet. |
| **Ábyrgdar-havandi av sáttmálanum** | Birgir av Steinum, deildarstjóri í KT Landsins, sum er deild á Gjaldstovuni, er ábyrgdarhavandi og hevur leiklutin sum verkætlanarstjóri fyri kundan og evstu ábyrgd av at raðfesta veitingar.<br><br>[navn á verkætlanarleiðara] er ábyrgdarhavandi fyri veitaran og hevur evstu ábyrgd av at veitingarnar hava nøktandi góðsku. |
| **Leikluturin** | Høvuðsleikluturin er verkætlanarleiðsla í breiðastu merking.<br><br>Verkætlanarleiðarin skal samstarva við starvsfólk á Gjaldstovuni, KT veitarar og starvsfólk á skúlunum. |
| **Uppgávur hjá veitara (veitingin)** | Uppgávurnar fevna um:<br><br>• Fyrireiking í samband við innliman av skúlum í Skúlanet<br>• Verkseting av skúlum í Skúlanet<br>• Gera tíðarætlan fyri verkætlanina<br>• Gera fíggjarætlan og tryggja at hon heldur<br>• Gera váðagreiningar<br>• Gera verksetingarætlan<br>• Hava samskifti við skúlar, kommunur, myndugleikar, veitarar og aðrar interessentar í verkætlanini<br>• Skipa fyri stýrisbólkafundum<br><br>**Uppfylging og frágreiðingar**<br>Sambært góðum verkætlanarleiðslusiði kunnar veitarin verkætlanarstjóran regluliga um framgongd og avbjóðingar við arbeiðinum. |

| | |
|---|---|
| | Væntað verður, at verkætlanarleiðarin er forvirkin at átaka sær teir leiklutir og tær uppgávur, tørvur er á, og er sinnaður at seta seg inn í nýggj øki, sum verkætlanarleiðarin ikki hevur vitan um og førleikar til frammanundan, eftir gjølligari avtalu og raðfesting. |
| **Amboð** | Verkætlanarleiðarin er við til at tillaga verandi amboð, greina tørv og útvega og seta nýggj amboð í verk.<br><br>Verkætlanarleiðarin skal brúka tey verkætlanarleiðsluamboð, ið kundin ger av at brúka í sínum dagliga arbeiði. |
| **Arbeiðstíð og -staður** | Tímatalið er sett at vera uml. 1400 tímar í virknari arbeiðstíð um árið. Verkætlanarleiðarin skal skipa sína arbeiðstíð í mun til tær verkætlanir, sum eru og møguligt skal vera at koma í samband við verkætlanarleiðaran í vanligari arbeiðstíð. Komandi verkætlanarleiðarin skal, innanfyri rímiligt mark, eisini góðtaka at arbeiða skiftandi tíðir, um neyðugt.<br><br>Gjaldstovan er sinnað at samráðast um møguligar broyttar fyritreytir í verkætlanini, ið krevja broytingar í sáttmálanum, sum t.d. tímatal og arbeiðstíðir. Arbeiðsstaðurin er Gjaldstovan, Kvíggjartún 1, Argir. |
| **Góðska** | Tað verður væntað, at veitarin loysir uppgávurnar innan karmarnar, sum loypandi verða avtalaðir, t.e. tíðarfreist og tímanýtsla, og á einum stigi, sum roknast kann við frá verkætlanarleiðarum við tí útbúgving og royndum, ið verkætlanarleiðarin hevur sambært CV.<br><br>Um verkætlanarleiðarin ikki hevur nøktandi vitan og førleikar til ávís serøki, skal verkætlanarleiðarin gera vart við hettar, soleiðis at kundin kann útvega neyðuga vitan og førleikar at tryggja góðskuna.<br><br>Veitarin kann við loyvi frá kundanum skifta nevnda verkætlanarleiðarin út ella fáa annan verkætlanarleiðara inn afturat í tí tíðarskeiði, sum sáttmálin er galdandi. |
| **Tímatakstur og endurgjald fyri útreiðslur** | Veitarin verður tímaløntur fyri sítt arbeiði.<br><br>Tímataksturin fyri verkætlanarleiðaran er [upphædd í kr.] + mvg. |

| | |
|---|---|
| | Tímataksturin er tann sami, uttan mun til um arbeiðið verður gjørt innan- ella uttanfyri vanliga arbeiðstíð, ella um tímatalið fer uppum minsta tímatalið, ið veitarin hevur tryggjað KT Landsins í hesum sáttmála.<br><br>Er talan um ferðing innan- og uttanlands, sum er partur av veitingini, verða tær meginreglur, ið eru galdandi fyri stovnar landsins, nýttar sum grundarlag fyri endurgjaldi av útreiðslum fyri ferðing, gisting og uppihald, um annað ikki er avtalað. |
| **Tíðarkarmur** | Veitarin og kundin eru samdir um ein tíðarkarm á uml. 1400 tímar um árið.<br><br>Kundin og veitarin taka frávik og ynski um meir/minni veiting upp í sambandi við mánaðarliga uppgerðir og framskriving. |
| **Tíðarnýtsla og virksemi** | Verkætlanarleiðarin skrásetur dagliga tímanýtslu og førir sokallaða loggbók fyri høvuðsvirksemi. Veitarin ger tímanýtslu upp mánaðarliga og sendir kundanum hana saman við loggbókini. |
| **Rokning** | Veitarin sendir kundanum rokning eina ferð um mánaðin, har skjalfesting fyri tímar í tíðarskeiðinum er hjáløgd. |
| **Trúnaður** | Báðir partar hava skyldu at viðgera vitan og tilfar um hvønn annan og loysnir hjá hvørjum øðrum í trúnaði. Verkætlanarleiðarin skal í sambandi við undirskrift av sáttmála undirskriva trúnaðarváttan, ið kundin útflýggjar.<br><br>Gjaldstovan er umfatað av reglunum um alment innlit. |
| **Skyldur hjá kunda** | Kundin hevur skyldu at tryggja, at leiðsla og starvsfólk við hóskandi førleika virka fyri, at veitarin kann loysa tær uppgávur, hann er settur at loysa.<br><br>Kundin veitir veitaranum upplýsingar og tilfar, sum eru viðkomandi fyri at loysa uppgávurnar.<br><br>Kundin hevur ábyrgd av at kunna viðkomandi partar og persónar um leiklutin hjá veitaranum og tær uppgávur, sum avtala er gjørd um. |
| **Rættindi til tað útinta** | Kundin fær øll rættindi, t.e. eisini upphavsrættindi, til tað, sum er útint av veitara í sambandi við henda sáttmála, m.a. rættindi til kotu, keldukotu og skjalfestingar umframt øll rættindi til at geva víðari, menna víðari og broyta tað útinta, soleiðis sum kundin ynskir tað. |

| | |
|---|---|
| | Veitarin varðveitir tó upphavsrættindi til arbeiðshættir (metode), ið eru mentir av veitaranum.<br>Tilfar, sum kundin hevur útflýggjað veitaranum, verður latið aftur í seinasta lagi, tá ið sáttmálin fer úr gildi.<br>Kundin góðtekur, at veitarin kann varðveita upplýsingar og vitan, sum veitarin nýtir at menna egið virksemi, tó soleiðis at hetta ikki er í stríð við avtaluna um rættindi og trúnað. |
| **At siga sáttmálan upp** | Sáttmálin kann sigast upp av báðum pørtum við skrivligari freist uppá 1 mánað. |
| **Mishald** | Við týðandi mishald av hesum sáttmála kann sáttmálin sigast upp uttan ávaring. |
| **Force Majeure** | Vanligar reglur um force majeure eru galdandi fyri henda sáttmála. |
| **Ósemjur** | Tekur ósemja seg upp ímillum partarnar, sum ikki ber til at loysa beinanvegin, skal boðast til samráðingar millum stjórarnar hjá pørtunum. Fæst eingin loysn í sátt og semju, verður trætan loyst við vanligum rættarmálið. Føroyskur rættur er galdandi. |
| **Gildistíð** | Hesin sáttmáli skal undirskrivast av báðum pørtum og kemur í gildi [XX.XX.XXXX] og er galdandi fram til og við [XX.XX.XXXX].<br><br>Sáttmálin kann verða longdur tvær ferðir eitt ár, tá sáttmálaskeiðið er liðugt, um báðir partar eru samdir um hetta. Tímataksturin kann í tí føri í mesta lagi hækkast við tí, sum svarar til lønarvøkstrinum á almenna arbeiðsmarknaðinum. |

| **Dagfesting [XX.XX.XXXX]** | **Dagfesting [XX.XX.XXXX]** |
|---|---|
| **Gjaldstovan – KT Landsins** | **[navn á veitara]** |
| | |
| *Undirskrift* | *Undirskrift* |
| **Birgir av Steinum, deildarstjóri** | **[navn á stjóra]** |